Broytingar á Bursatanga

ÚTBYGGING. Um- og útbyggingarvirksemi› á Tórshavnar Havn heldur fram. N‡ggja Norröna og n‡ggi Smyril fara at krevja betri umstø›ur

HØGNI MOHR

Tveir fastir men flótandi gestir eru vi› atløgubryggjuna á Bursatanga í Havn. Teir eita Norröna og Smyril. Men teir broytast í vavi. Um tvey ár kemur n‡ggja Norröna hjá Smyril Line og eftir ætlan ver›ur n‡ggi Smyril settur í sigling ári› eftir; í 2003.

Tórfinn Smith, forma›ur í havnarnevndini í Havn, væntar útbyggingar her á Bursatanga. Mynd: Jens Kristian Vang

Ov smalur skrái

Havnarnevndin í Havn vi› Tórfinni Smith á odda arbei›ir í hesum sambandi vi› at broyta m.a. atløguumstø›urnar hjá skipunum bá›um. Ney›ugt ver›ur at brei›ka betongskráan, har rampin á Norrönu skal vera. Rampin á n‡ggju Norrönu ver›ur á lei› f‡ra fer›ir so brei›ur sum á »gomlu« Norrönu. Eisini ver›ur ney›ugt at broyta landgongdina millum skipi› og Farstø›ina.

Smyril uttaná

Um summari› er mangan ney›ugt, at Smyril noy›ist at liggja vi› molan, tí Norröna ella farmaskipi› hjá Smyril Line leggja hald á bryggjuplássi› vi› Bursatanga. Men stendur ta› til formannin í havnarnevndini, ver›ur hetta broytt. Ver›ur útbyggingarætlanin hjá teimum veruleiki, er ikki óhugsandi, at ein lítil keistubbi ver›ur gjørdur sunnaru megin Kongabrúnna. Og so skal Norrøna liggja sum vant innafyri vi› reyvini nor›ureftir, me›an Smyril liggur vi› hennara st‡ribor›, vestaru megin hendan keistubba.

Parkeringsdekk

Tri›ja ætlanin hjá havnarnevndini er at fáa skil á parkeringsumstø›urnar vi› Farsstø›ina. Fólk, i› fer›ast dúgliga og annars koma á keiina vi› jøvnum millumbilum, vita, at ru›uleiki mangan valdar á økinum. Havnarnevndin umhugsar tí at gera eitt parkeringsdekk.

– Vit vita av royndum, at ta› er sera kostna›armiki› at fylla út á sjógv fyri at fáa størri øki. Spurningurin er tískil, um ikki ta› er ód‡rari at byggja omaná, sigur Tórfinn Smith í sambandi vi› ætlanirnar vi› parkeringsøkinum.

Stórar inntøkur

Forma›urin í havnarnevndini hevur enn onga hóming av, hvussu nógv alt hetta arbei›i› fer at kosta. Men inntøkurnar streyma framvegis inn í havnarkassan. Í ár er tali› á útlendskum fer›amannaskipum, sum vitja í Havn, 29. Tali› í fjør var 25. Longu nú hava 22 skip bo›a› frá, at tey koma á Havnina næsta ár.

Havnar- og brúgvagjaldi› fyri hvørt einstakt skip er vanliga úr 30.000 og upp ímóti 200.000 krónum, um skipi› er risastórt.

Skulu tvingast at samarbeiða

Ein nýggj ætlan hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, fer at tvinga tær føroysku kommunurnar at samstarva meiri. Men hon fer eisini at tryggja útjaðaran í Føroyum

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skulu tær føroysku kommunurnar verða noyddar at samstarva meiri, enn tær hava gjørt higartil.

Tað er í hvussu so er endamálið við eini nýggjari íløguætlan, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, nú fer at seta í verk.

Hann hevur gjørt eina nýggja íløguætlan fyri kommunurnar, sum skal fevna um allar kommunalar íløgur tey næstu fimm árini. Hendan ætlanin skal setast í verk longu næsta ár.

Endamálið við ætlanini er at býta alt landið sundur í nøkur øki.

Hvørt av hesum økjum fær so ein íløgukarm, sum kommunurnar í tí økinum skulu halda seg innanfyri.

Karsten Hansen sigur, at sum samfelagsbúskapurin er nú, verður samlaði íløgukarmurin hjá føroysku kommununum tey næstu árini á sama støði sum í ár, tvs, onkustaðni ímillum 160 og 175 milliónir.

Tó kann karmurin verða víðkaður, ella minkaður, alt eftir gongdini samfelagsbúskapinum annars.

Íløgukarmurin verður so býttur sundur ímillum tey ymsu økini eftir fólkatalinum í hvøjum øki.

Karsten Hansen sigur, at hann hevur havt fund við tey bæði Kommunufeløgini og tey taka undir við ætlanini.

Men tey halda, at tað er uppgávan hjá fíggjarmálastýrinum at býta landið sundur í øki, og tað verður nú gjørt.

Fíggjarmálaráðharrin veit ikki enn, hvussu økini koma at síggja út, men hann nevnir t.d., at Suðuroyggin er eitt natúrligt øki.

Og taka vit Suðuroynna sum dømi og siga at samlaði íløgukarmurin, er 175 milliónir, sleppur Suðuroyggin tilsamans at gera íløgur fyri góðar 19 milliónir um árið, sigur Karsten Hansen.

Tað kemur soleiðis fram, at íløguarmurin er 175 milliónir, býtt við fólkatalinum í Føroyum, sum 31. desember var 45.389, faldað við fólkatalinum í Suðuroynni, sum var 4.971 fólk tann 31. desember.


–Føroysku kommunurnar mugu ásanna, at skulu tey ymsu økini í landinum mennast, nyttar onki, at hvør kommuna bara hugsa um seg sjálva, sigur Karsten Hansen

Hóast landið verður býtt sundur í øki, verður tað tó altíð so, at tá ið hesi fimm árini eru farin, skal hvør einstøk kommuna hava fingið sín part av íløgunum eftir fólkatalinum í kommununi.

Noyðast at samstarva

Tann djúpara meiningin við hesi ætlanini, er, at kommunurnar í hvørjum øki skulu verða noyddar samstarva um, hvussu nógvar íløgur av tí samlaða karminum skulu gerast í hvørjari kommunu í økinum í hesum fimm ára íløguskeiðnum.

– Tað vil siga at ein kommuna í einum øki kann lata allar íløgur frá sær tað eina árið, afturímóti at at hon sleppur at gera tvær ferðir so nógvar íløgur árið eftir.

Karsten Hansen sigur, at hetta gevur kommununum nógv størri frælsi.

– Skulu íløgurnar býtast sundur til hvørja kommunu, verður tað mangan so, at tær fáa hvørki ráð til eitt ella annað.

–Men eftir hesi ætlanini fer tað at bera til hjá einari kommunu at samla íløgur saman í kanska trý ár til eina stóra verkætlan.

– Hetta skuldi eisini tryggja tær smáu kommunurnar ímóti tí, tær oftani eru mest bangnar fyri: nevniliga at verða slúktar av teimum størru kommununum.

Karsten Hansen sigur, at endamálið við hesi íløguætlanini er eisini at sleppa undan, at fleiri kommunur í sama øki gera íløgur í somu endamál. Hann heldur, at hetta skuldi tvinga kommunurnar at hugsa um alt øki og samstundis eggja kommununum til at fara undir fleiri felags verkætlanir.

Tryggjar útjaðaran

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at eftir hesi íløguætlanini er útjaðarin í Føroyum nógv betri tryggjaður, enn hann hevði verið, um kommunurnar sluppu at gera íløgur eftir fíggjarligari orku.

– Skuldu kommunurnar gjørt íløgur eftir fíggjarligari orku, vita vit, at tær allarflestu íløgurnar høvdu dottið niður í miðstaðarøkinum.

– Men eftir hesum leistinum er útjaðarin tryggjaður sín part. Og verða tað øki, sum ikki brúka sín part av íløgukarminum, kunnu hesar íløgurnar ikki verða fluttar til onnur øki í landinum, men fella burtur.

Karsten Hansen sigur, at hetta er eisini ein máti at tálma búskaparligu gongdini í miðstaðarøkinum, har nógv er at gera frammanundan.

Hann ivast ikki í, at íløgukarmurin er fer at nøkta tørvin á íløgum úti um landið, meðan kommunurnar í miðstaðarøkinum uttan iva kundu hugsa sær at gjørt nógv fleiri íløgur.

–Hann sigur, at kommunurnar mugu ásanna, at skal útjaðarin mennast, er tað neyðugt at hugsa um tey ymsu økini sum eina eind og at byggja tey út hareftir.

– Ongin fær nakað burturúr bara at hugsa um sína egnu bygd, leggur hann afturat.

Helena Dam á Neystabø sigur, at andstøðan í málinum um pensjónirnar, fer eftir manninum í staðin fyri bóltinum

Andstøðan jagstrar persónar

Helena Dam á Neystabø er sannførd um, at hon einki skeivt hevur gjørt í pensjónsmálinum. Hon heldur, at andstøðan leggur seg eftir henni í staðin fyri málinum

JOHN JOHANNESSEN

Helena Dam á Neystabø er sannførd um, at andstøðan førir eina miðvísa persónsjagstran móti henni.

Grundgeving hennara fyri hesum er, at andstøðan gjørdi greitt, at endamálið við at fáa landsstýrismálanevndina at kanna embætisførslu hennara var at fáa grundarlag fyri at leggja fram misálit móti henni.

Landsstýriskvinnan vísir tó á, at kanningin hjá landsstýrismálanevndini ikki prógvar, at hon hevur gjørt nakað skeivt. Har er nevniliga eingin niðurstøða, ið vísir á, at hon hevur forbrotið seg á nakran hátt.

Tí ætlar landsstýriskvinnan als ikki at leggja frá sær av sínum eintingum.

Vil fegin hava kanningarstjóra

Løgmaður hevur ásannað, at frágreiðingin hjá landsstýrismálanevndini vísir á nakrar spurningar, ið kunnu sáa iva um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø.

Men eisini løgmaður vísir á, at eingin niðurstøða, sum staðfestir, at landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum hevur forbrotið seg, er í frágreiðingini frá landsstýrismálanevndini.

Tí hevur løgmaður mælt til, at ein kanningarstjóri verður settur at kanna, um landsstýriskvinnan hevur borið seg skeivt at.

Hesum hevur Helena Dam á Neytstabø einki ímóti.

– Tað er í mínum áhuga, at allar lógir og reglur verða hildnar. Tí havi eg einki ímóti, at ein kanningarstjóri verður settur, sigur Helena Dam á Neystabø.

Landsstýriskvinnan leggur tó dent á, at hon hvørki mælir til ella frá, at ein slíkur kanningarstjóri verður settur. Hon vil bert gera greitt, at hon heldur tað vera í lagi, um løgmaður metir hetta vera neyðugt.

Helena Dam á Neystabø vil ikki siga, um Sjálvstýrisflokkurin tekur seg úr samgonguni, um hon missir landsstýrissessin.

Brotið stýrisskipanarlógina

Orsøkin til, at andstøðan við Kristiani Magnussen úr Javnaðarflokkinum á odda vildi hava landsstýrismálanevndina at kanna embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø var, at andstøðan metir hana hava brotið stýrisskipanarlógina.

Hetta skal landsstýriskvinnan hava gjørt, tá hon fyri hálvum ári síðani lækkaði lógarásettu, skattskyldugu pensjónina og ístaðin hækkaði umsitingarliga ásettu, skattafríu pensjónina vísandi til ein áseting um frádrátt í skattskyldugu inntøkuni í løgtingslóg um lands- og kommunuskatt.

Stýrisskipanarlógin staðfestir nevniliga, eins og grundlógin, at tað ikki er loyvt at áseta skatt umsitingarliga. Hetta skal gerast við løgtingslóg.

Torskilt mál

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum ásannar, at pensjónslógir eru ógvuliga torskildar. Hetta sigur hon ikki bert vera galdandi í Føroyum, men í øllum londum, vit vanliga samanbera okkum við. Eisini vísir hon á, at vanligt er í øllum londum, at broytingar javnan verða gjørdar í pensjónslógunum.

– Tær justeringar, eg havi gjørt í pensjónunum, eru gjørdar í fullum samráð við fleiri lógarkøn. Tí rokni eg ikki við, at tað fer at bera til at staðfest, at eg havi gjørt nakað skeivt, sigur Helena Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø sigur at enda, at tað er úrslitið av nýggju pensjónsskipanini, ið er avgerandi fyri hana, og ikki landsstýrissessurin.

Málið hevur verið greitt allatíðina

Kristian Magnussen er sannførdur um, at Helena Dam á Neystabø hevur brotið stýrisskipanarlógina. Hetta hevur hann verið sannførdur um síðani justeringar vóru gjørdar í pensjónsskipanini

JOHN JOHANNESSEN

Orsøkin til, at Kristian Magnussen vildi hava landsstýrismannanevndina at kanna embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø, áðrenn hann fór at leggja fram misálit móti henni var, at hann vildi sannføra aðrar tinglimir um, at hon hevur brotið stýrisskipanarlógina.



Sjálvur hevur Kristian Magnussen aldri verið í iva um, at landsstýriskvinnan bar seg skeivt at, tá hon fyri hálvum ári síðani gjørdi nakrar umsitingarligar justeringar í einari samtyktari løgtingslóg.

Tingmaðurin heldur eisini, at kanningin hjá landsstýrismálanevndini vísir tað sama. Tí heldur hann tað vera púra rætt at leggja fram misálit móti landsstýriskvinnuni, tekur løgmaður ikki sessin frá henni.

Ikki persónsjagstran

Kristian Magnussen vísir aftur útsagnunum hjá Helenu Dam á Neystabø um, at talan í hesum føri er um persónsjagstran, heldur enn at kanna eitt nágreiniligt mál.

– Var eg ikki sannførdur um, at Helena Dam á Neystabø so dyggiliga hevur brotið stýrisskipanina, hevði eg ikki áðrenn kanningin varð sett í verk sagt, at grundarlag var fyri at leggja fram misálit. Hetta hevði jú rakt meg harðari aftur, fór eg skeivur, sigur Kristian Magnussen.

Kristian Magnussen sigur, at eftir hansara tykki breyt bikari yvir, tá Helena Dam á Neystabø í tíðindaskrivi boðaði frá, at hon broytti samansetingina av pensjónini við at gera ein part skattafrían.

SKJÚRTUR, SLIPS OG SELAR
til føroyska búnan fáast hjá Kissa



P/F hjá KISSA
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95
Sosialurin - 311820